# Nøkur orð um R. K. Rasmussen og ritgerðir hansara.

*Eftir H. D. Joensen.*

*Rasmus Kristen Rasmussen* er borin í heim hin 8. november 1886 í Pedholt í Malling sókn sunnanfyri Århus í Danmørk, har faðir hansara var bóndi og átti garð. Í 1906 tók hann studentsprógv við Århus Kathedralskúla og á vetri 1914—15 læknaprógv við lærda háskúlan í Keypmannahavn. Hugur hansara stóð alla tíðina frá ungum árum til at gerast virkandi lækni úti millum fólk á onkrari landsbygd, men til tess at búgva seg út, var hann tey fyrstu 5½ árini lækni á ymsum sjúkrahúsum og samstundis í 1½ ár hjálparlækni í herliðnum.

Eiði hevði í 1912 fingið kommunulækna, men tá fyrsti læknin har í 1916 fekk annað starv, komu allar bygdirnar norðast á Streym- og Eysturoynni at liggja í læknaloysi í fleiri ár, hóast ferð eftir ferð var roynt at fáa lækna hagar. Dr. Rasmussen, ið sá hesar lýsingar ganga aftur og aftur, sigur seg meiri og meiri at hava kent tað á sær sum eina skyldu at fara til Føroya. Her var virkisøki og ætlandi umstøður av tí slagnum, hann hevði tokka til. Hann helt fram við útbúgving síni á sjúkrahúsum enn í nøkur ár, men søkti so og fekk Eiði, hagar hann flutti til og byrjaði starv sítt hin 27. juni 1920, 33 ára gamal. Her á Eiði varð hann verðandi øll síni manndómsár og gav fólkinum í teimum 17 bygdunum, hann hevði at røkja, alla megi sína og mátt í 32 ár, til hann hin 27. juni 1952, 65 ára gamal, flutti suður til Havnar at búgva.

Hvussu dr. Rasmussen røkti hetta læknastarv í hesi mongu ár er óneyðugt at lýsa her og í dag. Fólkið har norðuri dugir at siga sína søgu um hetta. Men sjáldan, kanska ongatíð, man ein maður hava verið betri lýddur bæði av høgum og lágum og hava runnið so inniliga saman við tað fólk, hann virkaði hjá. Lítillátin og stillfarandi í allari meðferð dugdi hann í starvi sínum at finna fram á so mangt, sum farið er framvið aðrar við bráðari lyndi. Hann dugdi at tiga, dugdi at lurta og at spyrja, ja, at trá-spyrja hvørt til sína tíð, so kunnleiki hansara til hetta fólk gjørdist óvanliga stórur samstundis við at hann í uppritsbøkur sínar fekk fest almikið um lív fólksins frá vøggu til grøv, um livikor og livihátt, føðslu, klædnabúna, siðir og við serligum áhuga um gomul heilsuráð. Frá heilt ungum árum hevur Dr. Rasmussen havt hug at savna og skrivliga siga frá og lýsa teir ógreiddu spurningar og tey vandamál, hann rakti við á síni leið. Og tað eru hesar gávur mannsins og starv hansara sum vísindamaður og rithøvundur, vit skulu tríva eitt sindur í her.

Víða hevur hann farið í kanningum sínum og stórliga hevur hann í so máta ríkað okkara bókmentir. 4 ár eftir tað, at hann var komin til Eiðis koma fyrstu ritgerðir hansara, og eru tær síðan — at kalla uttan íslit uttan í 1940-árunum, har tíðin varð vígd til uppritingararbeiði — komnar nærum á hvørjum ári fram til dagin í dag (sí ritgerðaskránna aftanfyri henda greinastubba). Lítið hevur dr. Rasmussen skrivað, sum *einans* hevur vísindaligan týdning, at kalla altíð dagar læknin og mannavinurin fram, samkenslan við tað fólkið, hann virkar hjá og ein trá eftir og vilji til at bøta um alt tað, sum honum tykist skeivt og avskeplað.

Aðalevni hansara tey fyrstu árini vóru eingilsk sjúka hjá børnum (1924, 1925, 1926), tuberklarnir (1924—33) og tey blindu (1924, 1926, 1932, 1934).

Greinarøðin um eingilsku sjúkuna er heil bók, har hann søguliga gjølla lýsir fyrikoming sjúkunnar áður í tíðini og

nú, umframt tær heilsuligu umstøðurnar í landinum, fólkaføðsluna og bústaðarviðurskiftini, og har hann endar við eggjandi orðum um at útvega børnunum meiri mjólk, sum einans kann fáast við at bøta um landbúnaðarviðurskiftini burturav, at geva øllum børnum lýsi, ikki at leggja burtur góðan gamlan sið, men sjálv at gera lýsi heima og at eta toskalivur.

Fyrimyndarligu rannsóknir og ritgerðir hansara um tuberklarnar í Eiðis læknadømi er aðrastaðni í hesi bók trivið í so tíðum, at her skal einans verða uppaftur tikið, at áttu vit ikki hesar kanningar, høvdu vit í dag ikki dugað at mett nakað stórvegis um gongdina á hesi sjúku her í oyggjunum júst tey ár, sjúkan hevur gjørt mest um seg.

Tá dr. Rasmussen kom higar til Føroya og fór undir yrki sítt, stúrsaði hann stórliga yvir tey nógvu blindu, hann rakti við, nógv fleiri enn hann var vanur at síggja, har hann kom frá. Einans ferð — í 1907 — hevði tá eygnalækni vitjað oyggjarnar, og tí fór hann beinan vegin undir at leita upp øll blind í læknadømi sínum og at kanna tey. Av hansara ávum kom aftur eygnalækni higar í 1923 og til henda royndi hann so at fáa øll tey blindu, hann vitsti um. Í 1924 kom ritgerðin um tey blindu í Eiðis læknadømi, og endar hann hana við kravi um, at øll blind í Føroyum gjølla verða kannað, og at útvegir fáast fyri, at fólk við brekaðum eygum kunnu fáa viðgerð í góðari tíð, áðrenn ovseint er. Í 1926 kemur ritgerðin um tey blindu í øllum Føroyum, og tekur hann uppaftur her kravið um, at eygnalækni má fáast higar í minsta lagið annaðhvørt ár. Honum eydnaðist at fáa løgtingið at játta, at eygnalækni kom til Føroya í 1932 við tí endamáli at ferðast út á bygdirnar og kanna øll blind og viðgera tey, sum hjálpast kundu. Í 1932 og 1934 komu so ritgerðir hansara um atvoldirnar til blindni. Honum untist tann gleði at síggja úrslit úr hesum starvi. Í 1926 var talið á blindum í Føroyum 49 uppá hvørjar 10.000 íbúgvar — hægst í øllum Norðurlondum — í 1932 einans 24, enn høgt, men fallandi.

Krøvini setur hann skilliga fram: Neyðugt er at fáa eygnalækna til Føroya einar 4—5 vikur á hvørjum ári. Bøtast má um kor teirra blindu, tí sum er — so tekur hann til — sita hesi mangan við lítlari ellisrentu og ongari avlamishjálp í sera trongum korum. Skipast má so fyri, at tey eins og aðrastaðni fáa høvi at læra okkurt handaverk. — Eins og vit vita er í hesum viðurskiftum síðan almikið broytt.

Men hesi fyrstu árini hevðist hann eisini at øðrum. Hann skrivar greinir um umfarsjúkur av lívsýki (1925, 1926) og fær kannað og uppspurt atvoldina til hesa sjúku.

Hann skrivar um kikhosta (1925), og er ein hin fyrsti, sum burtur av kannar og setur reglurnar fyri, nær og hvussu koppast skal móti kikhosta og hvørja vernd, henda kopping gevur. Lítið hevur síðan verið hjá øðrum at leggja aftrat hesum úrslitum.

Hann skrivar dygdargóða grein um snultudjór hjá fólki í Føroyum (1928) og søguligar og málsligar greinir um sjúkuna myalgia epidemica í Íslandi og í Føroyum (1931, 1933, 1935).

Hetta, sum dr. Rasmussen higartil hevði avrikað, var nógmikið til at gera hann kendan og umtóktan av øllum, sum skil høvdu á heilsuligum viðurskiftum. Kanningar hansara viðvíkjandi eingilsku sjúkuni, tuberklunum og teimum blindu eru stórarbeiði. Men kortini er tað ikki tær, sum gjørt hann hava so víðagitnan.

Í 1938 kemur ritgerð hansara um nátasjúkuna, henda grein, sum kønir menn í útheiminum hava skírt: «eitt framúrskarandi vísindaligt avreksverk», og sum kom at gera navn hansara kent starvsfelaga millum um allan mentaðan heim. Sjálvur hevði dr. Rasmussen, tá hann gjørdi hesar kanningar, ongan sjúkan sæð av nátasjúku. Støði hansara var tann frágreiðing, sum táverandi lækni suðuri í Vági, Arthur A. Rasmussen (nú Vaag), hevði borið fram í føroyska læknafelagnum í mai 1934 (og seinri í ritgerð) um farsótt, sum gingið hevði í 1933 í hansara læknadømi, og annars teir upplýsingar um sjúkuna, hann fekk sær frá

læknum aðrastaðni í Føroyum, sum høvdu havt tílíkar sjúklingar undir hond. Lítillátin leggur hann aftaná nágreiniligar kanningar og sammetingar úrslit síni úr hondum við hesum orðum: «Er tað prógvað, at nátin er smittuberin? Prógvað er tað ikki — minni enn so, men illtankarnir til hann eru svárir.» Longur slapp hann, við teirri hjálp, hann hevði, sjálvandi ikki á mál — tað varð so smitturannsóknarstovan á Robert Koch-stovninum í Berlin, sum endaliga prógvið førdi.

Fyrstu 15 árini aftaná hesa týdningarmiklu kanning er lítið komið frá dr. Rasmussens hond — at nevna er grein um kynsjúkur í Føroyum (1942—43) og blaðgrein um føroysk sjúkrahús (1944). Tað man vera í hesum árum, hann hevur lagt doyðin á at fullfíggja søvn síni um gomul føroysk heilsuráð, um tuberklarnar og um børnini í Eiðis læknadømi.

Men síðan hann flutti suður til Havnar at búgva, eru aftur komnar ritgerðir á hvørjum ári, og hevur hann her verið árbókini hjá tí nýstovnaða Fróðskaparfelagnum ein góður stuðul. Her finna vit greinir hansara um nausea epidemica (1952) og toxoplasmosis í Føroyum (1953), um illvøxtur (1954) og giktsjúkur (1955) í Eiðis læknadømi.

Fyri alt hetta ídna og týdningarmikla vísindarliga starv, sum Rasmussen, lækni, hevur útinnt, varð hann hin 23. november 1950 lýstur *doctor medicinae honoris causae* við lærda háskúlan í Keypmannahavn.

Enn stendur dr. Rasmussen mitt í virki sínum sum rannsóknarmaður og rithøvundur. Ritgerð hansara um gomlu føroysku heilsuráðini er um at vera liðug til prentingar, og sama er at siga um stóra yvirlitið yvir tær bókmentir, ið nerta við føroysk heilsu- og læknalig viðurskifti. Annað tilfar liggur eftir at skriva, t. d. um tuberklarnar í Eiðis læknadømi til 1952 og kanningarnar av børnunum í sama øki. — Málsligi áhugi hansara er stórur. Greinir hansara á donskum eru eyðkendar av tiltøkum til at skapa

nýyrði fyri tey ovurhonds mongu fremmandu heitini, sum fløða yvir í øllum donskum læknabókmentum. Hóast fullkønur í føroyskum hevur hann ikki hildið seg til at skriva føroyskt mál, men hevur av fullum huga eggjað og stuðlað monnum til at halda føroyskt vísindarligt mál reint fyri óhóskandi útlendsk lániorð. Tí ikki eigur meðferð hansara at verða misskilt sum undirgivni. Treiskur og áræsin hevur hann verið, tá hann helt seg hava rætt. Í 1953 skrivaði hann søguna um sinnissjúkramálið í Føroyum og aðra ritgerð har hann gjølla lýsir uppskot um sinnissjúkrahús her á landi. Hesi úrslit og uppskot bað hann løgtingið sleppa sær at greiða út í æsir fyri tingmonnum, og lítil ivi kann vera í, at tann einmælta viðtøka, sum nú um dagarnar var gjørd á tingi, í stórum er hesum starvi dr. Rasmussens fyri at takka.

Um ritgerðir dr. Rasmussens, bæði smáar og stórar, undir einum kann verða sagt, at tær goyma í sær so nógv meiri enn nøvn teirra boða frá. Har eru altíð drjúgvar søguligar frágreiðingar, og alt tað, sum eldri høvundar hava funnið, verður havt á lofti og umhugsað. Og almikið er av samfelagsligum upplýsingum frá eldri og nýggjari tíð, so hann í stóran mun á nógvum økjum í greinum sínum hevur skrivað brot úr heilsulagssøgu okkara. Egnu kanningar hansara eru sermerktar av stakum vandni, miklum atfinningarsemi og drjúgvum – tú kannst viðhvørt halda ov drjúgvum – og álítandi lýsingum av sjúkueyðkennum og smittusambandi. Ikki hevur hetta verið gjørligt uttan so, at hann ferð eftir ferð hevur noyðst at ganga hús úr húsi í øllum læknadøminum at fullfíggja søvn síni. Sjáldan man eitt læknadømi hava verið so kannað og troytt út í æsir sum hansara. Og undrunarvert er tað, at maður, sum í dagliga yrki sínum hevði ivaleyst fyri báðar hendur, skuldi fáa stundir at steðga á uppi yvir so mongum av tí, sum vit aðrir noyddust at fara fram við, uttan at geva okkum størri far um tað.

Onkur kundi nú spurt, hví hesin maður festi fót hjá

okkum, og hvussu honum hevur líkað her. Við hann, ið hetta skrivar, segði hann einaferð: «Ongatíð hevði eg hugsað mær, at lívið kundi vera so eydnuríkt. Mær er tað, sum kom eg higar í fyrradagin, so skjótt er tíðin runnin, og so gott havi eg havt tað. Eitt frálíkt fólk at búgva hjá.» –

Tað, ið maður ger í dagliga yrki sínum, kámast ofta skjótt burtur. Minnið doyr við javnaldrum hansara. R. K. Rasmussen sum virkandi lækni á Eiði verður gloymdur sum aðrir. Men standandi verða ritgerðir hansara, sum bera komandi ættarliðum boð um gerandislívið, um heilsu og lívshátt fólksins á hansara døgum.

## Ritgerðir eftir R. K. Rasmussen um læknavísindalig evni:

1. Rachitisundersøgelser i Ejde Lægedistrikt på Færøerne. Ugesk. f. læger *86*: 697–698, 1924.
2. Pirquet-undersøgelser i en færøsk Bygd. Ugesk. f. læger *86*: 696–697, 1924.
3. Om Blindhed og Øjensygdomme i Ejde Lægedistrikt på Færøerne. (Fra Lægeboligen i Ejde I). Bibliot. f. læger *116*: 777–788, 1924.
4. Om en Dysenteri- eller Paradysenteriepidemi i Ejde i 1923. (Fra Lægeboligen i Ejde II). Bibliot. f. læger *117*: 29–44, 1925.
5. Om Kighoste og Kighostevaccination i Ejde Lægedistrikt på Færøerne. (Fra Lægeboligen i Ejde III). Bibliot. f. læger *117*: 130–148, 1925.
6. Rachitisundersøgelser i Ejde Lægedistrikt på Færøerne. (Fra Lægeboligen i Ejde IV). Bibliot. f. læger *117*: 337–356, 381–393, 401–434, 1925.
7. Rachitisrannsóknir í Ejde-læknishéraði í Færeyjum. (Ágrip af grein í Bibliot. f. Læger 1925). Læknablaðið *12*: 178—179, 1926.
8. Tuberkuloseundersøgelser i Ejde Lægedistrikt på Færøerne. (Det fjärde nordiska tuberkulosläkarmödet i Stockholm 25'–27' August 1925). Stockholm 1926. Bls. 46–50.
9. Lidt om Tuberkelbacillens Egenskaber. Føroya felag móti tuberklasjúku. 1ste Aargang ved Heerup. Tórshavn 1926. Bls. 64.
10. Om en Paradysenteriepidemi i Ejde i 1925–26. (Fra Lægeboligen i Ejde V). Bibliot. f. læger *118*: 287–292, 1926.

11. Om Blindhed og Øjensygdomme på Færøerne. (Fra Lægeboligen i Ejde VI). Bibliot. f. læger. *118*: 536—545, 1926.
12. Pirquet examinations in a town on the Faroe Islands. Danish Pediatric Society Proceedings 1923—1925. Acta pædiat. *6*: 101—102, 1927.
13. Short summary of a treatise on «Rachitis in the medical district of Ejde, Faröe Isles.» Acta pædiat. *6*: 161—164, 1926—27.
14. Um blindu og augnsjúkdóma í Færeyjum. (Svar til Helga Skúla-sonar, læknis). Læknablaðið *13*: 143—145, 1927.
15. Um blindu og augnsjúkdóma í Færeyjum. (Nýtt svar til Helga Skúlasonar, læknis). Læknablaðið *14*: 114—117, 1928.
16. Dyriske Snyltere hos Befolkningen på Færøerne. (Fra Lægeboligen i Ejde VII). Ugesk. f. læger *90*: 410—412, 1928.
17. Om Myalgia acuta epidemica på Island. (Fra Lægeboligen i Ejde VIII). Ugesk. f. læger *93*: 56—58, 1931.
18. Tuberkuloseundersøgelser i Ejde Lægedistrikt på Færøerne. (Fra Lægeboligen i Ejde IX). (Trykt for Læger). (Sammendrag på Engelsk og Tysk). Thorshavn 1931. 136 bls.
19. Pirquetundersøgelse i Ejde Lægedistrikt på Færøerne. (Fra Læge-boligen i Ejde X). Hospitalstid. *74*: 926—934, 1931.
20. Om Årsagerne til Blindhed på Færøerne. (Fra Lægeboligen i Ejde XI). Bibliot. f. læger *124*: 79—91, 1932.
21. Om kendte Tilfælde af Tuberkulose i Ejde Lægedistrikt på Fær-øerne. (Fra Lægeboligen i Ejde XII). Ugesk. f. læger *94*: 753—757, 1932.
22. Myalgia acuta epidemica. (Fra Lægeboligen i Ejde XIII). Nord. med. tidskr. *5*: 776—780, 1933.
23. Om Tuberkulosens Indgangsfeber (Initialfeber). (Fra Lægeboligen i Ejde XIV). Ugesk. f. læger *95*: 915—918, 1933.
24. Blindhedsårsagerne på Færøerne. (Fra Lægeboligen i Ejde XV). Bibliot. f. læger *126*: 481—496, 1934.
25. Svar til en færøsk jordemoder. Tidssk. f. jordemødre *45*: 266—268, 1935.
26. Om Stind på Færøerne. (Fra Lægeboligen i Ejde XVI). Ugesk. f. læger *97*: 83—86, 1935.
27. Er primær epidemisk Alveolopneumoni og Psittacosis samme Syg-dom? (Fra Lægeboligen i Ejde XVII). Ugesk. f. læger *100*: 989—998, 1938.
28. Kynsjúkdómar á Færeyjum. Læknablaðið *28*: 154, 1942—43.
29. Lidt om Sygehuse og syge. Dimmalætting 30. aug. og 2. sept. 1944.
30. Papegøjesyge på Færøerne. Mikro *4*: 50—52, 1948.
31. Historien om Psittacosen på Færøerne. Ugesk. f. læger *112*: 994—995, 1950.

32. Plantur í føroyskum fólkamedisini. (Lagt til rættis til prentingar hava H. J. Jacobsen, búnaðarráðgevari, og R. K. Rasmussen. Í Heiðursrit til Rasmus Rasmussen á 80 áradegnum 13. august 1951. Varðin *29*: 161–174. Tórshavn 1951. –
33. Nausea epidemica í Føroyum. Fróðskaparrit *1*: 21–31, 1952.
34. Nausea epidemica på Færøerne. Ugesk. f. læger. *115*: 632–635, 1953.
35. Om Sindssyge og Sindssygehospital på Færøerne. Ugesk. f. læger *115*: 1035–1040, 1953.
36. Om sindssyge på Færøerne i Tiden 1820–1952. Bibliot. f. læger *145*: 29–40, 1953.
37. Spæde færøske Børns Påklædning i gamle Dage. Tidsskr. f. jordemødre. *63*: 265, 1953.
38. Um toxoplasmosis í Føroyum. Fróðskaparrit *2*: 100–114, 1953.
39. Om Toxoplasmose på Færøerne. Ugesk. f. læger *115*: 1905–1909, 1953.
40. Om spæde, færøske Børns Påklædning i gamle Dage. Budstikken bls. 54–60, 1954–55.
41. Um illvøkstur í Eiðis læknadømi 27. juni 1920–26. juni 1952. Fróðskaparrit *3*: 79–112, 1954.
42. Lidt om Mæslinger og om Tuberkulinprøven under denne Sygdom. Ugesk. f. læger *116*: 457–461, 1954.
43. Om Havhestesygen. Dimmalætting 21. apríl 1954.
44. Um giktsjúkur í einari føroyskari bygd. Fróðskaparrit. *4*: 83–101, 1955.
45. Eitt sindur um sukursjúku í Føroyum. Gluggin. *1*: 11, 1956.



Henda bók er vígd dr. med. h. c.

Rasmusi Kristen Rasmussen,

fyrrverandi kommunulækna á Eiði, í takksemi fyri ritgerðir hansara um føroysk heilsumál.

Sum einum av okkara egnu fagna vit hesum manni, ið gav mesta mátt sín og megi til at kanna, lýsa og bøta um fólkaheilsuna í oyggjum okkara.